## VIÐMERKINGAR

# Boykotta várframsýningina

**Arngerð Lamont**
*listafólk, innandura ark., lærari*

Listafólk ið arbeiða seriøst við list – boykotta várframsýningina – krevji at listasavni blívur almennur stovnur og ikki sum nú, partvíst almennur, soleiðis at ávísir persónar kunnu gera sær dalt av sjálvsognini. Hevur tað føroyska samfelagið ráð at gjalda 2 stjóralønir? hvat sigur skattaborgarin?

Vit hava ein kvinnuligan stjóra við listaligari útbúgving – hvat skulu vit gera við ein bankastjóra sum longu hevur koyrt ein banka á heysin og ongari listaligari útbúgving, hóast lýst var eftir stjóra við listaligari útbúgving.

G. Hoydal og G. Gunnbjørgsdóttir hava rætt í, at tað skal vera fólk við útbúgving.

Vatnissan í mentamálum tekur onga støðu, men at nokta at gjalda til brekað í kvøldskúlanum kann hann gott finna útav við eingla eygum.

Listaskálin skal vera fyri Føroya fólk at síggja »list« og ikki »kejserens nye klæder« fyri snobbar í áravís.

Tað er rætt sum G. Gunnbjørgsdóttir skrivar at T. Patursson er góður listamaður, men sum innandura arkitektur skuldi hann hildið seg frá, har hvørki skap, litir, ella funktión riggar.

Tað, sum vit hava brúk fyri er ein listaskúli. Hví iki »Drelnes« á Tvøroyri við tí sermerkta arkitekturi og náttúran í Suðuroy. Politikarar úr Suðuroy – vakni og síggi møguleikar ístaðinfyri avmarkingar.

# Orkupolitikkur skal eggja nýhugsan

**Ingi Olsen**
*løgtingsmaður*



*Verandi einkarættur hjá SEV eggjar ikki til nýhugsan, - hvørki hjá SEV ella øðrum. Vit mugu orða ein orkupolitikk, sum opnar fyri møguleikum at royna alternativa orku.*

SEV hevur einkarætt til gagnnýta nærum alt vatn í Føroyum fram til 2013. Hesin rættur verður helst longdur.

Tað er ikki heppi at, SEV er í eini monopolstøðu innan orkuveiting. Monopolið tryggjar SEV kundar og forðar fyri kapping er um prís og góðsku.

Hevði tað ikki verið natúrligt, at SEV missir einkarættin í 2013 og samstundis fær álagt at taka móti alternativari orku, um henda annars lýkur krøv um góðsku og er undir skipaðum viðurskiftum?

Eins og á so mongum øðrum økjum, so hevur heimurin kring okkum framt stórar broytingar viðvíkjandi teirra orkupolitikki. Kapping er komin í, og hevur hetta natúrliga havt við sær lægri prísir. Vit hava enn onga kapping, og ein kann bara gita um, hvørt tann prísurin vit gjalda er tann rætti. Tað er helst ein sannroynd, at tað er sera trupult at fáa at vita, hvat tann rætti prísurin er. Og um nøkur kanning verður gjørd, hvør skal so gera hesa? SEV?

**Hví hava privat framt so fá orkutiltøk?**
Havi sett mær spurningin, hvussu tað ber til, at so fá tiltøk eru framd av privatum, sum hava sum endamál at framleiða alternativa natúruvinarliga orku.

Skal eg koma við einum stuttum boðið - ja so kundi tað verið, at tað er eingin yvirskipað lóggáva, sum undirbyggir nakað sum helst hjá einum privatum at fara í gongd við.

Um einstaklingur ella vinnuvirki ætlar sær at gera íløgur í vinnutól til útvegan av orku, er ongin trygd fyri, at nakar avtakari er til framleiðsluna. Væl at merkja um ikki SEV stendur fyri hesi. Og enn minni er trygd fyri, at prísurin stendur í mát við tann prísin, sum SEV fær burtúrúr at framleiða.

**Orkupolitkkur í Løgtingi**
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, hevur nú lagt frágreiðing um orku fyri Løgtingi. Henda var til aðalorðaskifti týsdagin 15. februar.

Tað er gleðiligt, at fyrsta stigið nú er tikið at fáa orða ein yvirskipaðan orkupolitikk.

# So fekk Johan Dahl aftur ilt í sína sambandssál

**Áki Andreasen**



Í grein í Sosialinum leggur Johan Dahl, tingmaður Sambandsfloksins aftur eftir føroyska flogfelagnum, í røttum "sambandsanda" ramsar hann upp hvat Atlantic Airways er sloppið undan at gjalda.

Hetta er sami illviljin móti Atlantic Airways sum eyðkennir Sambandsflokkin og talsmaðurin í herferðini mótvegis flogfelagnum er framvegis Johan Dahl.

**Stjórin í Atlantic - og almennur stuðul.**
Í greinini vísir tingmaðurin til sendingina fimmarin, sum viðgjørdi spurningin viðv. stuðul til rækjuvinnuna. Har var samrøða við Magna Arge, stjóra í Atlantic Airways. Men her hevur Johan Dahl fingið ilt í sína sambandssál og skrivar: *"Tá ið farið var at tosað um almennan stuðul og at latað fara tað sum ikki kann bera seg, so haldi eg at tað var ikki sørt av mótsøgnum í at just Magni Arge, sum stjórnar Atlantsflogið skuldi viðgera hendan spurning"*

Eg havi ilt við at síggja hví stjórin í Atlantsflog ikki kann gera viðmerkingar ella svara spurningum frá einum tíðindafólkið - men tingmaður sambandsfloksins grundgevur soleiðis: *"Eg havi gjørt var við fyrr at Atlantic Airways - uttan samanbering - er tað almenna partafelag sum verður mest stuðla við almennum pengum"*

Johan Dahl so líkt so tekur hann ikki alt við - hann "gloymir" so hjartaliga at siga hvørjar treytir ein settur stjóri hjá Atlantic arbeiðir undir, somuleiðis "gloymir" hann at siga at stjórin í Atlantic ikki hevur verið avvísandi tá talan hevur verið um møguligar broytingar í flogferðsluni.

Hetta eru bert hálvt sum Johan Dahl leggur fyri dagin og ber týðuligt bráð av at hann vil sleppa at lufta sín illvilja mótvegis føroyska flogfelagnum, og nú beyðst so høvi.

Men eftir stendur framvegis spurningurin - hví kann stjórin í Atlantic ella persónurin Magni Arge ikki svara einum spurningi viðv. stuðli til vinnuna....??

**Johan Dahl og vinnulívið**
Tá so tingmaður Sambandsfloksins er so íðin eftir at seta treytir fyri hvat hvør kann úttala seg um, hví skal Johan Dahl so ganga fremst og tosað um vinnulív í Suðri t.d.....man hann vera nøkur fyrimynd fyri framtíðar vinnulívsmenn í Suðuroynni?? - stjórin í Atlantic kann ikki tosað um almennan stuðul... tí Atlantic hongur saman av stuðli...sigur Johan Dahl. So skuldi hann eisini lagt treytir á seg sjálvan!! Men tað kemur sjálvandi ikki uppá tal.

Tað kann av og á virka eitt sindur øvugt tá treytir skulu leggjast á nøkur fólk og so ikki á onnur, men tað er helst soleiðis Johan Dahl metir tað eigur at vera.

**Sambandssálin er í neyð**
Nei tað skínur ígjøgnum at sambandstingmaðurin enn einaferð nýtir høvi at leggja eftir Atlantic Airways. Men tað undrar ikki kortini, tað er góður sambandspolitikkur at skuldseta og finnast at tí føroysku loysnini. Tað verið seg á flogferðsluøkinum, skúlaøkinum, vinnuøkinum, heilsuøkinum og soleiðis kundi eg hildið áfram.

Eg skilji ikki hvat tað er so er so átrokandi at finnast at og niðurgerað, bert tað er føroyskt frá A til Z. Helst er tað tí at sambandssálin er í neyð; sambandsvøllurin er við at skortna - so skulu atfinningarnar sleingjast út til høgru og vinstru, tað má vera ilt hjá einum sambandsmanni sum Johan Dahl at síggja hvussu gott tað gongur hjá føroyska flogfelagnum - tað var ikki tað Sambandsflokkurin spáddi um okkara flogfelag í sínari tíð, men skuldi spádómarnir hjá Sambandsflokkinum gingið út so búðu vit als ikki í Føroyum - so einfalt er tað.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við